Rosmunda og Jákup Oluf runda gullhornið

Leygardagin kunnu hjúnini Rosmunda og Jákup Oluf Joensen úr Fuglafirði halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Lorvík fyri innbodnum. Í heili fimti ár hava tey drigið í felag og hetta vikiskifti verður hátíðarvikuskifti í teirra lívi.

Hjúnini eru bæði vælkend, sum ein partur av bygdarmyndini, í Fuglafirði. Tey hava verið sjónlig í teirra virki bæði tvey.

Rosmunda hevur, umframt at hava verið heimagangandi. eisini verið á arbeiðsmarknaðinum í mong ár. Meðan børnini vóru smá tók Rosmunda arbeiðið við heim. Hon knýtti trol heima.

Hon hevur eisini handlað. Hon hevði handilin Aldan niðri á kajini saman við bróðrinum Sigurdjon og har seldi hon útgerð til sjómenn, handskar og annað. Hon hevur eisini arbeitt fisk. Tey seinnu árini hevur hon arbeitt á Toystovuni í Fuglafirði.

Rosmunda er fitt í hondunum, hon plagar at brodera til føroysk klæ´ði, vestar, fyrikløð og annað

Rosmunda er dóttir Andreu og Christian Sofus Eldevig úr Fuglafirði. Tann kenda akkersmannin, sum hevði umsjónan við fortoyningum og teymum í eitt mannaminni. Tey fingu átta børn og Rosmunda er triðelst.

Jákup Oluf er ein kendur maður serliga millum fiskimenn. Hann hevur í eitt mannaminnið starvast á Havsbrún. Hann hevur við øll skipini at gera. Millum annað tosar hann flótandi íslendsk og tí er hann maðurin, sum hevur sambandið við íslendsk skip, sum landa á Havsbrún. Í mong ár syrgdi hann eisini fyri, at skipini fingu ís og tí var hevur hann ofta verið seinasti maður fiskimenn hava tosað við, áðrenn teir fóru undir nýggja túr. Og hann hevur mangan eisini verið fyrsti maður teir hava hitt, tá teir komu heim aftur eftir loknan túr.

Jákup Oluf er dámligur maður at tosa við og hann fylgir eisini við í samfelagnum og mangan hevur hann havt tíðindir at bera fiskimonnum, tá teir komu eftir ísi.

Jákup Oluf hevur verið samskipari av arbeiðinum við skipum á Havsbrún og hann er ein so fastgrógvin partur av Havsbrún og havnalagnum, at fólk hava ilt við at ímynda sær hetta umhvørvið uttan Jákup Oluf.

Jákup Oluf er sonur Honnu og Andreas Joensen úr Fuglafirði. Hann er einabarn. Tí hevur hann verið nógv knýttur at systkinnabørnunum, serliga teimum hjá Sáru.

Heimið hjá Rosmundu og Jákup Oluf hevur altíð verið eitt opið heim, har samlast øll. Seks barnabørn eru í flokkinum. Tey fýra børnini búgva ikki í Fuglafirði.

Rosmunda og Jákup Oluf eiga fýra børn. Hanna er elst og býr í Rituvík, Ann býr í Havn og tvíburðarnir Andras og Sonja búgva ávikavist í Danmark og Leirvík..

Hendan heilsanin er frá børnunum, sum ynskja foreldrunum hjartaliga tillukku við degnum.

Ár eru liðin síðan hendan myndin varð tikin av Rosmundu og Jákup Oluf, men hjúnalagið heldur enn og hetta verður feirað í bygdarhúsinum í Lorvík hetta vikuskiftið

†

Kunngjørt verður, at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

Henrik Mikael Magnussen
í Søldarfirði

føddur 27. august 1918, andaðist 23. oktober.

Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju fríggjadagin klokkan 14.

Familjunnar vegna
Andrea

Tey, ið vilja minnast Henrik, kunnu lata Bønhúsinum í Søldarfirði eina gávu.

Tøkk

Hjartaliga vilja vit takka øllum tykkum, ið á ymsan hátt hjálptu til tá kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

Gudmund Danielsen
Nólsoy

andaðist og var jarðaður.

Takk fyri vísta samkenslu og umsorgan, fyri alla hjálp, blómuheilsanir og til tykkum, ið fylgdu Gudmundi til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
Hanna

Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum 16. september. Guð vælsigni tykkum.

Klara og Hans Erik

heystnátt

(til agape)

sat eg einsamallur nátt og
leit út yvir myrkursbrá -
burtur var ið kendist gott og
tøgnin birtist aftaná

trøllsliga í homrum lótu
vindarnir sítt heystsins kvæð
sum eg ynskti at vit sótu
bæði her í góðum lag -
mánans ljósa høvur skygdi
yvir skýggjum Skamma stund -
eg sum mínar dreymar bygdi
fattaðist mín náttarblund

gjósturin frá hesum glugga
róku mær í minni brátt
søguløg sum stirdan ugga
hesa døpru heystsins nátt -

hann ið segði mær frá søgu
tonkum sum eg ikki sá -
og mær sýndist hesi røðu
vet av látri vera tá
og eg brast út úr at gráta -
ópti: "gævi tú vart her!"
hví tú fór er enn ein gáta
sum úr longslinum meg ber

hymeneus

Fólk givin at ferðast um Atlantshavið

Tey evropeisku flogfeløgini, sum hava rutur um Atlantshavið, hava flutt 36,2 prosent færri ferðafólk síðani atsóknirnar í USA tann 11. september.

Tann stóra afturgongdin kemur feløgunum sera illa við, og sambært meginfelagnum hjá evropeisku flogfeløgunum AEA verður tað verri enn.

Samstundis sum talið á ferðafólkið úr Evropa til USA er meira enn 30 prosent minni enn um hesa tíðina í fjør, er ferðafólkatalið á rutunum millum Evropa og Asia eisini minkað munandi. Sambært AEA er ferðafólkatalið á hesum rutunum minkað 14,8 prosent seinastu fimm vikurnar, og meginfelagið væntar, at talið verður uppaftur minni.

Á rutunum millum flughavnir í Evropa er ferðafólkatalið eisini minkað. Síðani 11. september hava 9,6 prosent færri verið á flogi enn somu tíð í fjør.

Leiðslan í AEA mælti í gjár ES-myndugleikunum til at loyva flogfeløgunum at niðurleggja einstakar farleiðir í avmarkað tíðarskeið. Sum er er hetta ikki loyvt sambært ES-reglunum.

Fleiri evropeisk flogfeløg hava tikið flogfør úr rutuflúgving, tí ferðafólkini eru so nógv fækkað. Týska Lufthansa kunngjørdi í gjár, at felagið umhugsar at seta 14 av sínum flogførum afturat teimum 28, sum eru tikin úr flúgving síðani 11. september.

USA skal skunda sær

Egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, ávaraði í gjár USA ímóti at halda ov leingi á við bumbuálopunum á Afghanistan.

– Tess drúgvari álopið gerst, tess breiðari verður gjógvin millum USA og tann arabiska heimin, segði Mubarak á einum tíðindafundi. Við eitt arabiskt tíðarrit segði hann seg vóna, at amerikanska álopið fær ein enda skjótt.

Egyptiski forsetin tók uppaftur, at hann tekur undir við amerikanska átakinum ímóti Osama bin Laden, men hann segði seg ivast í, at menn við avmarkaðari venjing frá einum flogskúla í Florida vóru førir fyri at stýra stórum ferðamannaflogførum inn í World Trade Center.

Hosni Mubarak er fremsti sameindi hjá USA í Miðeystri, men hann er eisini greiður yvir, at egyptiska fólkið er alt annað enn fegið um amerikansku bumbuálopini á Afghanistan.

1000 hitastig í tunnlinum

Millum 10 og 20 fólk doyðu av eldi og royki, eftir at tveir lastbilar stoyttu saman í Gotthard-tunnlinum í Sveits.

Teir báðir lastbilarnir vóru fermdir við bildekkum og bygningsplátum, og roykurin var tí øðiligur, tá eldur kom í báðar bilarnar. Sveitsisku myndugleikarnir halda, at tey flestu doyðu av roykeitran.

Hitin var eisini øgiligur. Sveitsiska løgreglan hevur roknað út, at hitin mundi koma upp í umleið 1000 stig, og eitt samdøgur eftir samanstoytin var hitin á vanlukkustaðnum framvegis umleið 200 stig. Tað var tí ógjørligt hjá bjargingarmonnunum at fara ov langt inn í tunnilin.

Teir báðir lastbilarnir stoyttu saman umleið hálvan annan kilometur frá tí syðra tunnilsmunnanum. Myndugleikarnir siga, at ein partur av loftinum í tunnlinum datt niður, og at millum 15 og 20 bilar komu at liggja undir.

Gotthard-tunnilin er 17 kilometrar langur og tann longsti ferðslutunnilin í heiminum. Ferðslan í tunnlinum hevur verið sera stór seinastu tvey árini, eftir at fronsku myndugleikarnir stongdu tunnilin við Mont Blanc eftir eina álvarssama vanlukku har í mars í 1999. Tann vanlukkan kravdi 39 mannalív. Mont Blanc-tunnilin verður latin uppaftur í næsta mánað.

(Fartekst)